# ítróttur

Nr. 57 • týsdagur • 21. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Vilja leikbanna lyklaspælara

**Stjørnan hevur sent inn kæru um atburðin hjá Nicoletu Radu Hansen í fyrstu FM-finaluni. Hetta eftir hending, sum sambært Stjørnuni eigur at fáa avleiðingar fyri spælaran**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um eina hending í seinna hálvleiki av fyrsta finaludystinum millum Stjørnuna og Neistan. Upptøkurnar í 3-2 mánakvøldið sýndu sjónliga, at Nicoleta Radu Hansen og Bára S. Klakstein vóru áfastar, og hetta endaði við, at Neistaspælarin hirdi armin móti mótstøðuspælaranum, sum small í gólvið.



*Bára Skaale Klakstein mátti hjálpast av vøllinum, eftir at hon varð sligin av Nicoletu Radu Hansen*

### Nyttuleysar upptøkur

Dramatisku myndirnar á skíggjanum hava nú sannført Stjørnuna um, at farast skal víðari við málinum.

Á heimasíðuni hjá Norðlýsinum verður sagt, at tey í Stjørnuni ikki vilja lata slíkan atburð fara fram við borðinum, og at kæra tí er send inn um hendingina. Sum skilst, so verður í kæruni kravt, at tilburðurin fær fylgjur.

Tað er tó lítið sannlíkt, at talan verður um nakra revsing til Neistan ella til Nicoletu Radu Hansen.

Fyri tveimum árum síðani varð staðfest, at so leingi sum Hondbóltssambandið ikki hevur positivaa heimild at nýta videoupptøkur í próvførslu síni, so verður hetta ikki gjørt. Og sum skilst, so er støðan hjá kappingarnevndini framvegis hin sama.

– Nú havi eg ikki sæð kæruna enn, men er hon send okkum, so fara vit sjálvandi at viðgera hana, sigur Julian Olsen, formaður í kappingarnevndini. Men hann leggur afturat, at tey neyvan fara at taka støðu út frá videoupptøkum.

– Hatta er sjálvandi eitt av førunum, har vit burdu havt heimild at nýta slíkar upptøkur í prófførsluni. Men tað hava vit so ikki, og tí dugi eg illa at síggja, hvat vit kunnu gera við málið, sigur Julian.

### Eingin intern revsing

Fyri tveimum árum síðani varð eisini tosað um møguleikan at nýta upptøkur sum prófførslu. Hetta var eftir eina ógvusliga hending í dysti millum Kyndil og VÍF í Havn.

Ta ferðina var niðurstøðan hjá kappingarnevndini júst tann, at tey ikki kundu nýta video sum prógrundarlag, og tí metti nevndin seg ikki kunna taka støðu í málinum.

Hinvegin, so tóku vestmenningar tá sakina í egnar hendur, og góvu egnum spælara leikbann, tað sum eftir var av kappingarárinum. Men tað er ein støða, sum tykist sera lítið sannlík hesaferð sambært formanninum í Neistanum, Jón Kragesteen.

– Sjálvandi er talan um eina keðiliga hending, og vit fara sjálvandi at tosa innan hýsis um hetta. Men tú skalt ikki rokna við, at vit av okkara eintingum fara at geva Nicoletu nakað leikbann undan næsta finaludystinum. Nú havi eg ikki granskað upptøkurnar, men sum eg havi skilt tað, so var eisini ein orsøk til, at Nicoleta reageraði, sum hon gjørdi. Og hendingin er undir ongum umstøðum somikið tyngjandi, sum hon var hjá VÍF fyri tveimum árum síðani, staðfestir formaðurin.

### Nervakríggj

Soleiðis skal neyvan roknast við, at kæran frá Stjørnuni fær avleiðingar av nøkrum sum helst slag. Men hon reisir enn einaferð spurningin, hvørt tað ikki er upp á sítt pláss, at kappingarnevndin fær heimild at nýta videoupptøkur sum prógrundarlag.

Men mest av øllum, so staðfestir hon kanska eisini sálarliga partin av spælinum, nú næsta finalan stendur fyri framman. Eitt sálarligt spæl, har øll kneb eru loyvd, og har parturin við kølnasta yvirlitinum aloftast stendur sum vinnari.

## NÍF kærir Fram…

Fram kom í fjør víðari í kappingini um løgmanssteypið, tá kappingarnevndin hjá FSF kom eftir, at KÍ hevði nýtt tríggjar ikki-skrásettar spælarar, tá teir spældu móti Fram í fyrsta umfarinum.

Nú er tó líkt til, at Fram sjálvir verða sendir út eftir somu uppskrift. Sum skilst, so hevur Fram í dystinum móti NÍF leygardagin nýtt ikki-skrásettar spælarar, og hetta hevur NÍF sent inn kæru um.

**-mørk**

## …og Fram kærir NÍF

Fram sigur seg hava sent FSF kæru, har teir vísa á, at NÍF ikki hevði síni viðurskifti í lagi til dystin í kappingini um løgmanssteypið

Í Fram vilja tey ikki sita hendur í favn, nú NÍF hevur sent inn kæru um vantandi spæliloyvi hjá Fram í dystinum millum liðini leygardagin.

Fram hevur í kvøld sent kappingarnevndini hjá FSF kæru, har teir eisini vísa á, at nólsoyingarnir ikki høvdu øll síni viðurskifti í lagi.

Soleiðis verða tvær kærur um sama dyst, sum kappingarnevndin skal taka støðu til, tá nevndin hevur fund í vikuni.

**-mørk**

## VB nýggja nevnd

Á aðalfundinum hjá Vágs Bóltfelag í farnu viku varð nýggj nevnd vald. Formaðurin tey seinastu árini, John Henrik Holm, bar seg undan afturvali og tí varð nýggjur formaður valdur.

Formaðurin í Vágs Bóltfelag eitur nú Jan Haldansen, og nevndin er annars mannað soleiðis: Jan Haldansen, formaður, Eydis Kjærbo, skrivari, Heidi Poulsen, peningarøkil, Vídgis Nolsøe, form. í Hondbóltsdeildini, Kirstin Ludvig, form. í Fótbóltsdeildini og Mia Krosslá, form. í Húsanevndini.

**-ek**

## Eykaaðalfundurin verður 6. mai

Fótbóltssambandið hevur nú ásett dagin, har føroysku fótbóltsreglurnar verða endaliga ajourførdar.

Tað hevur í longri tíð verið greitt, at neyðugar dagføringar skulu fremjast, soleiðis at føroyska regluverkið er í samsvar við tað hjá FIFA og UEFA.

Ætlandi skuldi uppskotið um lógarbroytingarnar leggjast fyri aðalfundin, men talan er um tíðarkrevjandi arbeiði, og tí varð boðað frá, at eykaaðalfundur ístaðin skuldi haldast um hetta.

Tann fundurin er altso ásettur at verða 6. mai, og so fæst at vita, hvørt føroysku feløgini velja at taka undir við alttjóða krøvunum.

Hartil skal eykaaðalfundurin eisini taka støðu til, hvussu stigatalvan skal gerast upp, tá lið standa jøvn í stigum. Eitt uppskot frá kappingarnevndini um evnið varð lagt fyri aðalfundin í februar, men eftir drúgt kjak varð tá avrátt, at málið varð útsett, nú eykaaðalfundur kortini skuldi haldast.

**-mørk**

## Skála vil ikki hava Goran

Skála hevur seinastu vikurnar havt Goran Markovic til royndarvenjingar. Ætlanin var, at serbiski spælarin skulu roynast sum avloysari fyri Nenad Stankovic, ið ikki fekk longt sítt arbeiðsloyvi í Føroyum.

Nú er royndartíðin hjá Markovic av, og niðurstøðan hjá Skála er, at hann er ikki rætti maðurin til felagið, skrivar heimasíðan hjá Skála.

Onnur feløg hava sýnt áhuga fyri Markovic, og sambært heimasíðuni hjá Skála vandi hann við ÍF.

**-ek**

## Gunnar aftur á vøllinum

Gunnar Nielsen spældi annan hálvleikin í venjingardystinum hjá Frem ímóti LFA leygardagin. Frem skuldi spæla ímóti Skjold í donsku 1. deild, men dysturin varð avl‡stur orsaka av frosi í vøllinum. Allir teir tríggir føroysku spælararnir hjá Frem komu á vøllin í hálvleikinum. Jónas Tór Næss spældi høgri bakkur, Atli Gregersen í miðverjuni, og Gunnar Nielsen stóð í málinum. Gunnar hevur verið plágaður av einum skaða seinastu vikurnar, men nú var hann aftur at síggja vøllinum. Einki mál kom í dystinum.

**-ek**